# Føroysk maraton-renning altjóða góðkend

**Tórshavn Marathon, ið Bragdið fyriskipar, fekk herfyri altjóða góðkenning frá heimskenda maraton-rennaranum Hugh Jones**

ÍTRÓTTUR
*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*



*Hugh Jones nýtti ein serligan teljari á einari súkklu, tá ið hann kannaði rutuna hjá Tórshavn Marathon*

Fyrsta vikuskiftið í juni fekk Bragdið, fyriskiparafelagið av Tórshavn Marathon, vitjan av heimskenda maratonrennaranum Hugh Jones. Hugh Jones varð vinnari av enska London Marathon í 1982 og gjørdist nummar 5 í heimsmeistarakappingini í 1987, men kom í hesum sambandi sum umboðsmaður frá altjóða felagsskapinum AIMS. Uppgávan hjá Hugh Jones var at kanna, um rutan hjá Tórshavn Marathon kundi góðkennast sum eina altjóða maratonrutu, og hetta eydnaðist. Hugh Jones kannaði rutuna við serligum mátiútgerðum. Rutan fekk nakrar broytingar, men varð síðan góðkend.

Tórshavn Maraton verður 7. septembur í ár. Altjóða góðkenningin og limaskapurin í AIMS verður ein stórur vinningur hjá marknaðarføringini av Føroyum, greiður Bragdið frá í einum tíðindaskrivi til Sosialin. Í ítróttarblaðnum Distance Running hjá AIMS, ið kemur út í 40.000 eintøkum kring allan heimin, verður føroyska tiltakið lýst. Hesin altjóði limaskapurin fer lokka enn fleiri útlendingar henda vegin, skrivar Bragdi. Til ber at melda seg til tiltakið á www.torshavnmarathon.com










**ProTools HD í Studio Pegasus, Klaksvík, er til sølu.**

- ProTools HD v/fleiri góðum plug-ins
- Mac-telda
- og annað hardware

Ring 456500 ella maila til alvin@ras2.fo og fá meir at vita.



STUDIO PEGASUS tlf 456500



Felagsskúlin á Oyrarbakka



**Hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum í 8., 9. og 10. fl. :**

- undirvísa gentum í ítrótti og svimjing
- undirvísa í tilevning
- undirvísa í týskum
- undirvísa í føroyskum, donskum og enskum
- undirvísa í lívfrøði, landalæru og søgu

**Førleikakrøv**

Lærarаútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.
Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum og hava hollan kunnleika til teldur sum amboð/miðil í frálæruni.
Tó kunnu læraralesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**

Setanarøkið er Felagsskúlin á Oyrarbakka. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.
Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.
Tey føstu størvini verður sett frá 1. august 2008, og tað tíðaravmarkaða starvið verður sett fyri skúlaárið 2008 - 2009.

**Søkt verður eftir 3 lærarum**

- 2 føst fulltíðarstørv. Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.
- 1 tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/09 vegna avlopstímar. Starvið er umleið 15 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett eftir 1. september.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- vilja taka við teimum broytingum, ið flyta skúlan til at taka ímóti teimum avbjóðingum samfelagið setir næminginum

Felagsskúlin á Oyrarbakka
Skúlavegur 8
400 Oyrarbakki
tlf. 21 20 84 · t-postur: joningi@skulin.fo

**Umsóknarfreistin er fríggjadagin 20. juni 2008, kl. 12.00.**